## Turkiskir Corolla stationcar



Toyota Motor Manufacturing Turkey (TMMT) í Adapozari í Turkalandi sum framleiða Corolla sedan, eru nú eisini farnir at framleiða Corolla stationcar. Ætlanin er, at verksmiðjan eftir fyrsta kvartal í 2003 skal hava útflutt 25.000 Corolla stationcar og 28.000 sedan til 25 lond harav tey 22 eru í Evropa

*Kelda: Toyota Danmark A/S*

## Liðugt við Th!nk



Ford keypti í 1999 norsku verksmiðjuna Pivo Industri, ið tá høvdu framleitt elbilin Th!nk í nøkur ár. Eftir at hava sett eina milliard krónur í fyritøkuna, góvust teir nú við Th!nk. Orsøkin er, at sølan bert bleiv 20 prosent av tí, teir upprunaliga roknaðu við

*Kelda: Motor Magasinet*

## Toyota/ Nissan samstarv



Tað var heilt óhugsandi fyri fáum árum síðan, at tvær japanskar bilverksmiðjur kundu samstarva um framtíðar verkætlanir. Nú eru so Toyota og Nissan farnir at samstarva um framtíðar hybridbilar, ið skulu koyra dupult so langt uppá liturin, sum vanligir bilar annars gera í dag

*Kelda: Motor Magasinet*

# Renault Mégane II – annarleiðis og smart design

**Við Renault Mégane II vilja fransmenn bróta við pástandin um, at allir nýggir bilar líkjast. Renault Mégane II kemur á marknaðin seinni í ár við tveimum útgávum við 3 og 5 hurðum, sum ikki likjast heilt**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Ofta verða bildesignaðir lastaðir fyri at gera bilmodell sum líkjast øllum hinum, og sum flestu fólk kunna góðtaka. Hesir bilar verða ofta anonymir og lítið spennandi. Seinastu modellini hjá Renault hava víst, at teir tora at ganga sínar egnu leiðir. Nýggi Mégane líkist nógv teimum stóru Renault luksusbilunum Avantime og Vel Satis. Bilurin er bygdur yvir ein heilt nýggjan plattform, ið er gjørdur í samstarvi við Nissan. Í fyrstu atløgu kemur nýggi Mégane II í útgávum við 3 og 5 hurðum.

Tað er ikki bert útsjóndin sum er nýggj og annarleiðis. Mégane er fyrsti bilur í heiminum við "Submarining"-airbag í framsetrunum, ein skipan ið forðar fyri, at bilførarin og síðumaðurin kunnu glíða úr trygdarbeltunum undir eini harðari uppbremsing ella í eini ferðsluvanlukku. Síðu- og gardinairbag eru eisini standard. Tríggir bensinmotorar frá 98 til 134 hk og tveir dCi dieselmotorar við ávikavist 82 og 120 hk verða at velja ímillum. Seinni koma aðrir motorar. Vit frætta meira um Renault Mégane II, tá teir koma hendanvegin.



*Renault Mégane II við 5 hurðum. Útgávurnar við 3 og 5 hurðum líkjast ikki heilt á síðuni*



*Renault Mégane II við 3 hurðum. Annarleiðis og smart design. Seinastu modellini hjá Renault hava víst, at teir tora at ganga sínar egnu leiðir*



*Renault Mégane II innan. Bilurin fæst við dupultum sóltaki, ið gevur gott ljós inn í bilin*

# Berg Motors - selt Mazda Premacy nr.100

**Tá Heðin Hádal og familjan komu inn á gólvið hjá Berg Motors seinasta hósdag at avheinta ein nýggjan Mazda Premacy, blivu tey móttikin við blómum og heilsanum. Orsøkin var at tey høvdu keypt Premacy nr.100**

BILKEYP
*Magnus Gunnarsson*

Mazda Premacy varð fyrstu ferð sýndur fram á Genève bilaframsýningini á heystið 1999, og fyrsti bilurin kom higar í januar 2000. Hjá Berg Motors siga tey, at bilurin beinanvegin bleiv sera væl umtóktur sum familjubilur. Premacy er ein 5 persónabilur, men frá desember í ár at rokna kemur bilurin á føroyska marknaðin við 7 setrum. Frá januar 2003 fæst hann eisini við einum 100 hk dieselmotori. Bilurin er rættuliga væl útgjørdur við nógvari standardútgerð sum m.a. fjarstýrt sentrallás, hitaði forsetur, traction control, aircondition, eykalyktir framman og el-síðurútar framman og aftan. Flúgvaraborð eru til tey ferðandi á baksetrunum. Síðan Premacy fyrstu ferð bleiv sýndur fram fyri trimum árum síðan, hevur hann fingið nógvar kappingarneytar. Næstan øll bilmerkir hava nú ein MPV í sínari vøruskrá. Mazda Premacy og Renault Scénic vóru millum teir fyrstu í hesum klassanum. Mazda hava bæði Premacy og tann størra, sum heilt einfalt eitur Mazda MPV. Berg Motors hava annars selt 190 nýggjar Mazda bilar í ár.




*Heðin Hádal og familjan fingu eitt "yvirraskilsi", tá tey blivu móttikin við blómum og heilsanum seinasta hósdag. Axel Ljósheim frá Berg Motors handar her billyklarnar saman við einum blómutyssi til Benadiktu og Heðin saman við døtrunum Annu og Mariu. Bilurin er ein Premacy 1,8i GLX*



# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

**FORD ESCORT VAN 1,6**
Árg 1996, Km 75.000. Kr. 65.000.

**OPEL ASTRA 1,7D**
Árg 1997, Km 101.000. Kr. 89.000.

**PEUGEOT 306 1,9TD**
Árg 1997, Km 150.000. Kr. 90.000.

**OPEL ASTRA 1,7DT**
Árg 1996, Km 95.000. Kr. 78.000.

**PEUGEOT 406 2,1TD**
Árg 1997, Km 136.000.
Kr. 143.000.

**VW PASSAT 1,9TD**
Árg 1997, Km 55.000. Kr. 148.000.

**OPEL ASTRA 1,6**
Árg 1998, Kr. 92.000.

**OPEL VECTRA 1,8**
Árg 2000, Km 22.000. Kr. 174.000.

**OPEL ASTRA 1,6**
Árg 1995, Km 60.000. Kr. 67.000.

**OPEL VECTRA 1,7D**
Árg 1995, Km 118.000. Kr. 76.000.

**OPEL ASTRA 1,6**
Árg 1997, Km 58.000. Kr. 78.000.

**PEUGEOT 106D**
Árg 1997, Km 71.000. Kr. 65.000.

**AUDI 100**
Árg 1987, Km 290.000. Kr. 15.000.

**FIAT MAREA 1,6**
Árg 1996, Km 70.000. Kr. 80.000.

**FORD ESCORT VAN 1,8D**
Km 52.000. Kr. 54.000.

**OPEL ASTRA CLUB 1,6 ST.CAR**
Árg 1996, Km 98.000. Kr. 70.000.

**FORD ESCORT 1,8 DIESEL**
Árg 1995, Km 152.000. Kr. 65.000.

**NISSAN PRIMERA 2,0**
Árg 1997, Km 45.000. Kr. 95.000.

**OPEL ASTRA 1,6 ST.CAR**
Árg 1993, Km 116.000. Kr. 55.000.

**NISSAN ALMERA 2,0D**
Árg 1998, Km 121.000.
Kr. 110.000.

**OPEL ASTRA 1,7D**
Árg 1996, Km 156.000. Kr. 75.000.

**OPEL VECTRA 2,0DTI**
Árg 1998, Km 96.000. Kr. 120.000.

**NISSAN PRIMERA 1,6**
Árg 1998, Km 70.000. Kr. 125.000.

**OPEL ASTRA 1,7DT**
Árg 1998, Km 91.000. Kr. 95.000.

**OPEL ASTRA 1,6**
Árg 1995, Km 109.000. Kr. 60.000.

**TOYOTA AVENSIS 2,0 DIESEL**
Árg 2000, Km 85.000. Kr. 165.000.

**NISSAN ALMERA 1,6SR**
Árg 1996, Km 89.000. Kr. 78.000.

**PEUGEOT 306 1,9D**
Árg 1996, Km 134.000. Kr. 78.000.

P/F Meinhardt Arge
Tel 345400 nissan@nissan.fo heimasíða: www.nissan.fo

**ROVER 200**
Árg Feb-99, Km 40.000. Bensin.
Kr. 114.000.

**FORD MONDEO 1,8I**
FN 381
Árg 11/00, Km 28.000. Bensin
NÝSÝNAÐUR. Kr. 158.000.

**SEAT CORDOBA TDI SPORT**
Árg 07/00, Km 85.000. Diesel.
Kr. 126.000.

**BMW 316I**
Árg 12/92, Km 168.000. Bensin. Kr. 98.000.

**VW BORA 2,0**
Árg Apr-99, Km 40.000. Bensin.
Kr. 148.000.

**TOYOTA COROLLA 2,0 D STC.**
Árg 01/96, Km 176.000. Diesel.
Kr. 99.000.

Fleiri av bilunum eru til sølu til niðursettan prís

Bilasølan v/ Øssur Johannesen
tel 315354 - www.audi-vw.net

LÝSIÐ
við



brúktum
bilum
í Sosialinum

